September 2022

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Vanlukkutrygging*

betri trygging

# Vanlukkutrygging


## 1. Nøkur orð um tína vanlukkutrygging 3

## 2. Felagstreytir 3

2.1 Hvør er tryggjaður 3
2.1.1 Heiltíðarvanlukkutrygging 3
2.1.2 Frítíðarvanlukkutrygging 3
2.1.3 Barnavanlukkutrygging 3
2.1.4 Ungdómsvanlukkutrygging 3
2.1.5 Eldravanlukkutrygging 3
2.1.6 Felagsvanlukkutrygging 3
2.2 Nær tekur tryggingin við 3
2.2.1 Heiltíðarvanlukkutrygging 3
2.2.2 Frítíðarvanlukkutrygging 3
2.2.3 Barnavanlukkutrygging 3
2.2.4 Ungdómsvanlukkutrygging 3
2.2.5 Eldravanlukkutrygging 3
2.2.6 Felagsvanlukkutrygging 3
2.3 Hvar tekur tryggingin við 3
2.3.1 Gjald 4
2.3.2 Prístalsjavning 4
2.3.3 Nær og hvussu kann tryggingin sigast upp ella broytast 4
2.3.4 Flyting og váðabroyting 4
2.3.5 Serligur váði hjá: 4
2.4 Um skaðin hendir 4
2.5 Krígs-, jarðskjálvta- og kjarnorkuskaðar o.a. 5
2.6 Kærumøguleikar 5
2.7 Lóggáva 5

## 3. Felags ásetingar 6

3.1 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin um 6
3.2 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin ikki um 6
3.3 Hvussu verður endurgjaldsspurningurinavgjørdur 7
3.4 Hvussu verða skaðarnir endurgoldnir 7

## 4. Dømi um avlamisstig 10

## 5. Tilvalstryggingar 11

*Tryggingarnar í deild 5 eru bert galdandi, um hetta er tilskilað í tryggingarskjalinum.*

5.1 Skundendurgjald 11
5.2 Tyggiskaðar 11

betri trygging

# Vanlukkutrygging

## 1. Nøkur orð um tína Vanlukkutrygging

Í hesum bóklingi sært tú, hvat ein heiltíðar-, frítíðar-, eldra-, felags-, ungdóms- og barnavanlukkutrygging fevnir um.

Tað er nevnt í tryggingarskjalinum, hvørja trygging tú hevur í Betri Trygging.
Hygg í tryggingarskjalið, um tín vanlukkutrygging er soleiðis, sum tú vilt hava hana.

Um tú vilt hava meira at vita, er Betri Trygging  til tænastu.

## 2. Felagstreytir

### 2.1 Hvør er tryggjaður

**2.1.1 Heiltíðarvanlukkutrygging**
Tryggjaðir eru teir persónar, ið nevndir eru í tryggingar-skjalinum. Tryggingin fellur burtur 1. gjalddag eftir at hin tryggjaði hevur fylt 74 ár.

**2.1.2 Frítíðarvanlukkutrygging**
Tryggjaðir eru teir persónar, ið nevndir eru í tryggingar-skjalinum. Tryggingin fellur burtur 1. gjalddag eftir at hin tryggjaði hevur fylt 70 ár.

**2.1.3 Barnavanlukkutrygging**
Tryggjað eru tey børn, sum nevnd eru í tryggingarskjalinum. Børn eru teir persónar, ið ikki hava fylt 18 ár.

**2.1.4 Ungdómsvanlukkutrygging**
Tryggjaðir eru teir persónar, sum eru nevndir í tryggingar-skjalinum. Ungdómar eru teir persónar, ið eru 18 ár, men ikki fyltir 29 ár.

**2.1.5 Eldravanlukkutrygging**
Tryggjaðir eru teir persónar, sum nevndir eru í tryggingrar-skjalinum. Hetta eru persónar, ið eru 60 ár og eldri.

**2.1.6 Felagsvanlukkutrygging**
Tryggjaður er tann persónsskarið, ið nevndur er í sátt-málanum.

### 2.2 Nær tekur tryggingin við

**2.2.1 Heiltíðarvanlukkutrygging**
Tryggingin tekur við alt samdøgrið.

**2.2.2 Frítíðarvanlukkutrygging**
**a.** Tryggingin tekur við í frítíðini.
**b.** Tryggingin tekur ikki við, tá ið vanlukkur henda undir:
**1.** arbeiði sum sjálvstøðug vinnurekandi,
**2.** arbeiði fyri onnur t.e. vanlukkutilburðir umfataðir av lógarkravdari trygging ímóti arbeiðsvanlukku ella aðrari líknandi skipan í øðrum londum,
**3.** hernaðar-, heimaverndar- og sivilverjutænastu og øðrum líknandi umstøðum.

**2.2.3 Barnavanlukkutrygging**
**a.** Tryggingin tekur við alt samdøgrið og heldur uppat frá tí degi, barnið fyllir 18 ár.
**b.** Um ynskt verður at tekna eina nýggja trygging (ungdóms-, frítíðar- ella heiltíðarvanlukkutrygging), skal ein venda sær til Betri Trygging.

**2.2.4 Ungdómsvanlukkutrygging**
**a.** Tryggingin tekur við alt samdøgrið og heldur uppat frá tí degi tryggjaði fyllir 29 ár.
**b.** Um ynskt verður at tekna eina nýggja trygging (frítíðar-ella heiltíðarvanlukkutrygging), skal ein venda sær til Betri Trygging.

**2.2.5 Eldravanlukkutrygging**
Tryggingin tekur við alt samdøgrið.

**2.2.6 Felagsvanlukkutrygging**
Tryggingin tekur við sambært ásetingum í serligum sáttmála.

### 2.3 Hvar tekur tryggingin við

**a.** Vanlukkutryggingin tekur við allastaðni í Føroyum, Danmark og Grønlandi.
Í Europa annars tekur hon við upp til 3 ár, og aðrastaðni í heiminum í upp til 1 ár.

**b.** Um tryggjaði búsetist uttan fyri Europa - tó Grønland undantikið - í longri enn 1 ár, heldur endurgjaldsskyldan uppat, uttan so at annað er tilskilað í tryggingarskjalinum.

**c.** Ein frítíðarvanlukkutrygging skal altíð broytast til eina heiltíðarvanlukkutrygging, tá ið tryggjaði er búsitandi uttan fyri Føroyar.

# Vanlukkutrygging

**2.3.1 Gjald**

**a.** Gjaldið verður ásett eftir galdandi gjaldskrá hjá Betri Trygging.

**b.** Fyrsta tryggingargjaldið fellur til gjaldingar, tá ið tryggingin tekur við, og seinri gjøld síðani til ásettu gjaldingar. Krav um gjalding verður sent til tann gjaldingarstað, sum tryggingartakarin hevur givið upp. Verður gjaldið ikki goldið eftir 1. krav, sendir felagið tryggingartakaranum skrivliga áminning, og fyri hesa kann eitt eykagjald verða skuldskrivað honum.
Í hesi áminning verður upplýst um rættaravleiðingarnar av, at gjaldið ikki er goldið, tá ið ásetta tíðarfreistin er liðin.
Tílík áminning verður send í fyrsta lagi 14 dagar eftir 1. krav. Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, fellur endurgjaldsskylda felagsins burtur.

**2.3.2 Prístalsjavning**

Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi tveimum prosentum í mun til árið fyri.
Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

**2.3.3 Nær og hvussu kann tryggingin sigast upp ella broytast**

**a.** Báðir partar kunnu siga tryggingina upp skrivliga við 1 mánaða freist til mánaðarlok. Verður tryggingin ikki uppsøgd, verður hon endurnýggjað fyri eitt ár í senn.

**b.** Broyting í tryggingartreytunum kann gerast og setast í verk til eitt mánaðarlok. Broytingin skal fráboðast skrivliga við í minsta lagi 1 mánaða freist.

**c.** Um tryggingargjaldið verður hækkað, hevur Betri Trygging skyldu til skrivliga at boða frá tí við 1 mánaða freist til mánaðarlok.

**d.** Frá tí degnum, Betri Trygging hevur móttikið eina skaðafráboðan og til 1 mánaða eftir, at endurgjald er latið, ella skaðin er vístur burtur, kunnu bæði tryggingartakarin og Betri Trygging siga tryggingina upp skrivliga við 14 daga ávaring.

**e.** Ístaðin fyri at siga tryggingina upp, kann Betri Trygging - eisini við í minsta lagi 14 daga ávaring - gera eitt framhald av tryggingini treytað av broyttum umstøðum, t.d. avmarkingum í, hvat tryggingin fevnir um ella hækkan av tryggingargjaldi.

**2.3.4 Flyting og váðabroyting**

Betri Trygging skal hava boð beinanvegin, um ein av teimum tryggjaðu flytir bústað.
Um tryggjaði gerst arbeiðsleysur, skal hetta fráboðast Betri Trygging í seinasta lagi innan 3 mánaðir. Tá tryggjaði aftur fer í vinnu, skal hetta fráboðast Betri Trygging beinanvegin.

Fær ein tryggjaður við heiltíðartrygging annað arbeiði, skal Betri Trygging eisini fáa boð um hetta beinanvegin.

Tryggingin verður so tillagað teimum nýggju váðaumstøðunum.

Hevur Betri Trygging ikki beinanvegin fingið boð um broyting í váðaumstøðunum, verður endurgjald bert latið í mun til tryggingargjaldið, ið er goldið, og tað, ið átti at havt verið goldið, um Betri Trygging hevði fingið boð um broytingina, áðrenn vanlukkan hendi.

Verður ein tryggjaður við frítíðartrygging sjálvstøðugur vinnurekandi, skal Betri Trygging eisini hava boð um hetta beinanvegin. Tryggingin skal tá tillagast broyttu umstøðunum.

**2.3.5 Serligur váði hjá:**

**a.** Førara av motordrivnari súkklu, har ferðin er omanfyri 45 km/t. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tryggjaði hevur gyldugt koyrikort.

**b.** Førara av flúgvara umframt fyri flogmanning í tjóðarskrásettum flogfari. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tryggjaði hevur gyldugt loyvisbræv til avvarðandi flúgving.

**c.** Persónum, ið arbeiða á oljuboripallum.

Um tryggingarskjalið ikki hevur átekning um, at tryggingin fevnir um omanfyri nevnda váða, verður bert veitt hálvt endurgjald.

## 2.4 Um skaðin hendir

Hendir ein skaði, skal Betri Trygging skjótast gjørligt hava eina skrivliga fráboðan við læknavátтan. Oyðiblaðið fæst frá Betri Trygging.

Tann, ið hevur fingið skaða, skal vera undir neyðugari læknaviðgerð, og felagið hevur rætt til at biðja um upplýsing hjá einum og hvørjum lækna, ið viðger ella hevur viðgjørt skadda, og lata hann kanna av einum av felagnum valdum lækna.

Um tryggjaði doyr, skal Betri Trygging fráboðast innan 48 tímar. Felagið hevur rætt til at krevja líkuppskurð.

# Vanlukkutrygging

Betri Trygging rindar útreiðslurnar fyri tær læknaváttanir, kanningar o.a., sum vit krevja.

## 2.5 Krígs-, jarðskjálvta- og kjarnorkuskaðar o.a.

Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum beinleiðis ella óbeinleiðis er elvdur av:

**a.** Kríggi, krígslíknandi umstøðum, uppreistri ella borgarligum ófriði. Tryggingin tekur tó við undir slíkum umstøðum, tá ið tryggjaði er staddur í einum landi uttan fyri Føroyar, tó í mesta lagi upp til 1 mánaða frá ófriðurin byrjaði.

Treytin fyri at tryggingin tekur við, er at:

**1.** tey tryggjaðu ikki fara til eitt land, sum er í einari av teimum nevndu støðunum.
**2.** tey tryggjaðu ikki sjálv eru við í tí, ið fer fram.
**3.** skaðin ikki elvdist av nýtslu av kjarnorkuvápnum ella kemiskum vápnum.

**b.** Jarðskjálvta ella øðrum óvanligum náttúrufyribrigdum í Føroyum (Danmark og Grønlandi við).

**c.** Kjarnorkufyribrigdum, t.d. kjarnuklúgving (fission), kjarnubræðing (fusion) og geislavirknum fáni, antin skaðin hendir í krígstíð ella friðartíð.

## 2.6 Kærumøguleikar

**a.** Um tryggjaði ikki er nøgdur við viðgerðina hjá Betri Trygging, kann verða kært til Ankenævnet for Forsikring. Kærunevndin kann tó bert viðgera kæruna, um:

**1.** tryggjaði til fánýtis hevur roynt at fingið eina nøktandi avtalu við Betri Trygging.
**2.** Betri Trygging ikki innan 3 vikur hevur svarað einari skrivligari áheitan frá tryggjaða.
**3.** tryggjaði rindar kærunevndini eitt gjald, sum kærunevndin hevur ásett. Gjaldið verður goldið aftur, um tryggjaði fult ella lutvíst fær viðhald í kæruni, um kæran verður víst burtur, ella um tryggjaði sjálvur tekur kæruna aftur.

Kæran skal sendast kærunevndini á einum ávísum kæru-oyðiblaði, sum fæst við at venda sær til:

Betri Trygging P/F
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn
Telefon nr 348600
www.betri.fo

Forsikringsoplysningen
Amaliegade 10
1256 København K
Telefon 33 43 55 00
millum kl. 10 og 16
www.forsikringsoplysningen.dk

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2
1572 København V.
Telefon 33 15 89 00
millum kl. 10 og 13
www.ankeforsikring.dk

**b.** Um tryggjaði ikki er nøgdur við ásetta avlamisstigið kann verða kært til:

Arbejdsskadestyrelsen
Æbeløgade 1
Postsmoga 3000
2100 København Ø.
Tel. +298 39 17 77 00
www.ask.dk

Betri Trygging rindar útreiðslur í sambandi við kæruna, um so er, at tryggjaði fær fult ella lutvíst viðhald í kæruni.

## 2.7 Lóggáva

Fyri tryggingina er annars “Lóg um tryggingaravtalur” galdandi.

# Vanlukkutrygging

## 3. Felags ásetingar

### 3.1 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin um

**a.** Tryggingin gevur rætt til skaðabót fyri vanlukkutilburð, sum er at skilja sum ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at atvoldarsamband er ímillum vanlukkutilburðin og skaðan. Í metingini verður millum annað tikin støða til, um hendingin er skikkað til at elva til persón-skaða. Hetta merkir, um hvørt hendingin í sær sjálvur er nóg mikið til at elva til skaðan.

**b.** Drukning, likamligur skaði elvdur av frosti, hitaslagi ella sólstingi.

**c.** Beinleiðis fylgjur av skaðaávirkan, sum í mesta lagi vara nakrar fáar dagar, tá ið skaðin fevnir um sár, bløðrur ella gø ella eru komin av staðbundnum evnafrøðiligum evnum, ið eru ørkymlandi fyri holdið ella etjandi.

**d.** Beinleiðis fylgjur av barnalamningi (polio myelitis anterior acuta), sum fyrstu ferð vísir seg í fyrsta lagi 30 dagar eftir, at tryggingin tekur við. Seinni fylgjur eftir barnalamningi t.e. post polio syndrom fevnir tryggingin ikki um.

**e.** Barnavanlukkutryggingin fevnir eisini um:
**1.** Beinleiðis fylgjur av heilaserkbruna(meningitis cerebrospinalis epademica).
**2.** Fullkomiligan miss av sjónini á øðrum ella báðum eygum, sum er fylgja av sjúku.
**3.** Fullkomiligan miss av hoyrn á øðrum ella báðum oyrum, sum er fylgja av sjúku.

Endurgjald verður tó bert goldið fyri sjúkur, ið ikki eru viðføddar, og sum fyrstu ferð sýna sjúkueyðkenni í fyrsta lagi 30 dagar eftir, at tryggingin hevur tikið við.

Fyri grein 2 og 3 er tað eisini ein treyt, at sjúkan fyrstu ferð vísir sjúkueyðkenni, eftir at barnið er fylt 3 ár.

### 3.2 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin ikki um

**a.** Fylgjur av avlamni, ið var áðrenn vanlukkutilburðin. Eitt verandi avlamni kann tí ikki ávirka, at avlamisprosentið verður sett hægri, enn um eitt tílíkt avlamni ikki hevði verið.

**b.** Skaða, elvdur av smittu, t.d. frá bakterium og virusi. Teir skaðar, ið eru nevndir undir 3.1 C eru tó umfataðir, meðan veitingarnar í 3.1 E bert fevna um barnavanlukkutrygging.

**c.** Fylgjur, ið sýna seg seinni, eftir polio, t.e. post polio syndrom.

**d.** Støður, sum sambært læknaligum (medisinskum) royndum ikki vera hildnar elvdar av vanlukkutilburði, men eru íkomnar av sjúku ella sjúkubroytingum. Tað er eisini galdandi, hóast støðan verður staðfest eftir ein vanlukkutilburð.

**e.** Fylgjur av læknaligari viðgerð, sum ikki var í samband við vanlukkutilburð, sum tryggingin fevnir um.

**f.** Skaðar á tenn og tannprotesur komnir av at tyggja.

**g.** Vanlukkutilburðir, sum skaddi sjálvur hevur verið atvoldin til. Hetta er galdandi, hóast sinnislag og vitsku hjá skadda. Møguligt deyðsendurgjald verður tó goldið, um hjúnarfelagi ella ómyndug børn sita eftir, og um tryggingin hevur verið í gildi í minsta lagi 1 ár.

**h.** Vanlukkutilburðir, elvdir av grovum ósketni ella sjálvgjørdum rúsi, íroknað ávirkan av narkotika ella øðrum líknandi eiturevnum.

**i.** Vanlukkutilburðir, sum henda undir luttøku ella venjing í:
**1.** nevaleiki, karatu og líknandi kampítrótti, fjallaklintran, fallskjólslopi og líknandi, eins og kaving við súrevnisfløsku.
**2.** motorkappkoyring av øllum slagi á breyt ella øðrum avbyrgdum øki.

Tryggingin kann tó fevna um hesar vanlukkutilburðir, um tað er tilskilað í tryggingarskjalinum.

Tó fevnir tryggingin um einstaka hending, har tryggjaði tekur lut í vandamiklari ítrótt, sum er nevnd í grein i. Hetta er galdandi hóast tað ikki er tilskilað í tryggingarskjalinum.

Við einstaka hending er at skilja eitt tiltak, so sum polter-abend, føðingardagur, privat frítíðarferð, ráðstevna o.tl., sum tryggjaði er partur av. Tað er ein treyt fyri dekningi, at luttøkan er undir vegleiðing av serkønum og at øll krøv innan økið – bæði trygdarkrøv og lógarkrøv – er lokin.

# Vanlukkutrygging

## 3.3 Hvussu verður endurgjaldsspurningurin avgjørdur

**a.** Betri Trygging nýtir somu siðvenju sum Vanlukkutryggingarráðið, tá ið avgerð verður tikin um tað, ið hent er:
**1.** kann góðkennast sum vanlukkutilburður,
**2.** hevur ført við sær brekið ella deyðan,
**3.** hevur viðført avlamni. Avlamisstigið (sí grein 4) verður ásett eftir læknafrøðiligari metan, uttan mun til serstaka yrki hins tryggjaða. Støddin av avlamisveitingini veldst um avlamishæddina í tryggingarskjalinum.

**b.** Avlamisstigið verður ásett eftir vegleiðandi ummæli frá serlækna. Somuleiðis kann Betri Trygging eisini heita á Arbejdsskadestyrelsen um vegleiðandi ummæli til áseting av avlamnisstigi. Betri Trygging rindar læknakanningar og læknaváttanir.

## 3.4 Hvussu verða skaðarnir endurgoldnir

**a.** Endurgjaldið er í mun til hvat tryggingin fevnir um og tær upphæddir, ið nevndar eru í tryggingarskjalinum. Endurgjaldið verður ásett við galdandi tryggingarhædd, tá ið vanlukkan hendi, sum grundarlag.
Endurgjaldið verður veitt sum deyðsendurgjald/jarðarferðarhjálp, avlamisendurgjald, endurgjald fyri tannskaðar og dagpeningur.

**b. Endurgjald við deyða.**
**1.** Tryggjaði kann við teimum avmarkingum, lógin ásetur, avgera, hvør skal hava deyðsendurgjaldið. Um ikki nakar er settur at hava framíhjárætt, og hetta stendur í tryggingarskjalinum, fáa næstu avvarðandi hjá tí deyða deyðsendurgjaldið. Tað er eftir lógini hjúnarfelagi ella, um eingin slíkur situr eftir, børn hjá tí deyða. Um heldur eingi børn eru, eru tað arvingarnir hjá tí deyða.
**2.** Endurgjald til ómyndug verður goldið eftir lógini um fæ hjá ómyndugum.
**3.** Var tann deyði fyltur 68 ár, verður deyðsendurgjaldið sett niður til niðanfyri nevndu prosent av tryggingarhæddini:

| | |
|---|---|
| Var tann deyði 68 ár: | 90% |
| Var tann deyði 69 ár: | 80% |
| Var tann deyði 70 ár: | 70% |
| Var tann deyði 71 ár: | 60% |
| Var tann deyði 72 ár ella eldri: | 50% |

Ein vanlukkutilburður gevur ikki heimild til endurgjald fyri bæði avlamni og deyða. Tí verður tann upphædd drigin frá í deyðsendurgjaldinum, sum møguliga er goldin sum avlamisendurgjald.

**c. Endurgjald við avlamni.**
**1.** Avlamisendurgjaldið er eins nógv prosent av tryggingarhæddini fyri avlamni, sum avlamisprosentið er ásett til.
**2.** Avlamisstigið, í sambandi við vanlukkutilburðin, verður ásett við læknaligari meting sum grundarlag, og ætlað verður um hvørjar vansar, vanlukkutilburðurin førdi við sær, ið ávirka persónliga lívslag hjá skadda, tó við frádrátti av einum undan vanlukkutilburðinum verandi avlamni.
Um ein vanlukkutilburður hevur ført við sær varandi avlamni, hevur skaddi rætt til endurgjald.
Avlamisstigið verður avgjørt, so skjótt fylgjurnar av vanlukkutilburðinum kunnu metast, tó seinast 3 ár aftan á vanlukkutilburðin. Sami vanlukkutilburður gevur ikki rætt til endurgjald fyri bæði deyða og avlami.
**3.** Vanlukkutilburður, ið leiðir til avlamisstig uppá 5% ella meiri, gevur rætt til endurgjald. Avlamisstigið, orsakað av sama vanlukkutilburði, kann ikki setast hægri enn 100%.
**4.** Leiðir vanlukkutilburður til avlamisstig 30% ella meiri, verður veitt ískoytisendurgjald, ið er eins mong prosent av avlamisendurgjaldinum og avlamisstigið er. Hetta ískoytisendurgjald verður lækkað við 1/10 um árið, frá tí at hin tryggjaði hevur fylt 57 ár, soleiðis at ískoytisendurgjaldið er heilt burturfallið, tá tryggjaði hevur fylt 66 ár.
**5.** Fyri persónar, sum hava fylt 68 ár, verður endurgjaldið sett niður til niðanfyri nevndu prosent av tryggingarhæddini:

| | |
|---|---|
| 68 ár: | 90% |
| 69 ár: | 80% |
| 70 ár: | 70% |
| 71 ár: | 60% |
| 72 ár ella eldri: | 50% |

**6.** Avlamisendurgjaldið verður roknað eftir avlamisstigi og aldri hins skadda tann dagin, vanlukkan hendi.
**7.** Avlamisendurgjaldið verður latið til skadda, men fellur burtur, um tann skaddi doyr, áðrenn avlamisprosentið er ásett.
Endurgjald til ómyndug verður goldið eftir lógini um fæ hjá ómyndugum.

**d. Serreglur fyri Eldravanlukkutrygging**
Reglurnar í 3.4.B.3., 3.4.C.4. og 3.4.C.5., eru ikki galdandi fyri Eldravanlukkutryggingar.

**e. Serreglur fyri barnavanlukkutrygging**
**1.** Um avlamisprosentið fyri børn undir 18 ár er 30 ella omanfyri, verður umframt goldið 25% av endurgjaldinum – í mesta lagi 100.000 kr. til tann ella teir persónar, sum hava foreldramyndugleikan, tá ið útgoldið verður, at ráða yvir.

# Vanlukkutrygging

**2.** Er tann skaddi myndugur, tá ið útgoldið verður, verður upphæddin rindað honum.
**3.** Jarðarferðarhjálp verður goldin eftir somu reglum sum endurgjald við deyða fyri tilkomin og er 25.000 kr.

**f. Tannskaðar**
**1.** Rindaðar verða rímuligar og neyðugar útreiðslur – í mesta lagi 5% av tryggingarhæddini fyri avlamni – til tannviðgerð, elvd av vanlukkutilburði í tann mun, útreiðslurnar ikki verða endurgoldnar aðrastaðni, t.d. frá lógarkravdari trygging ímóti arbeiðsvanlukku, heilsutrygd ella sjúkratrygging.
**2.** Eftir somu reglum verður endurgjald latið fyri tannprotesur av vanlukkutilburðum, um protesan verður skadd, meðan hon er í munninum.
**3.** Ein tannskaði kann ikki geva størri endurgjald enn tað sum samsvarandi neyðug viðgerð av einari frískari tonn kostar. Hetta er galdandi uttan mun til, um ein skadd tonn møguliga er liður í einari brúgv, at grannatenn vanta, ella ein skadd tonn var veik frammanundan.
**4.** Vanlukkutryggingin fevnir ikki um umvæling ella vanligt viðlíkahald av tonnum, sum eru gjørdar aftur í sambandi við undanfarin óhapp, og har henda útreiðslan varð goldin av tryggingini.
**5.** Tryggingin tekur bert við skaðum á protesur, um tryggingin fevnir um avlamisendurgjald.
**6.** Tryggingin tekur ikki við skaðum á tenn og tannprotesur, komnir av tygging.
**7.** Tannviðgerðir framdar 5 ár eftir vanlukkutilburðin verða ikki endurgoldnar.
**8.** Fyri barnavanlukkutrygging verður ikki endurgoldið fyri tannviðgerð eftir at tryggjaði er fyltur 25 ár.

**g. Brillur og hoyritól**
Endurgjald verður veitt fyri brillur og hoyritól – í tann mun útreiðslurnar ikki verða endurgoldnar aðrastaðni, t.d. frá lógarkravdari trygging ímóti arbeiðsvanlukku, heilsutrygd ella einari sjúkratrygging – men bert tá ið brillurnar og hoyritólið verða skadd í sambandi við persónskaða ella av slagi í andlitið/undir vangan. Í báðum førum er tað tó ein treyt, at skaðin hendir, meðan skaddi hevur brillurnar/hoyritólið uppiá. Endurgjald verður tó bert veitt fyri brillur og hoyritól, um tryggingin fevnir um endurgjald fyri avlamni. Á sama hátt fevnir tryggingin um kontaktlinsur, um tær, tá ið tær verða skaddar, eru í eygunum.

Í hesum sambandi eru brillur at skilja sum hjálpiamboð at bøta um manglandi ella vánaliga sjón. Tað vil siga, at tryggingin ikki fevnir um sólbrillur uttan styrki, kosmetiskar brillur ella kosmetiskar kontaktlinsur.

Tað er ein treyt, fyri endurgjaldi fyri brillustell, at útreiðslurnar kunnu skjalprógvast.

**h. Viðgerðar- og flutningsútreiðslur**
**1.** Til avlamisstigið er endaliga ásett, verður goldið fyri rímuligar og neyðugar útreiðslur til læknafyriskipaðar viðgerðir hjá sálarfrøðingi, fysioterapeuti og eisini rímuligar útreiðslur til kiropraktor viðgerð, tá ið viðgerðin er ein beinleiðis avleiðing av einum vanlukkutilburði, sum tryggingin fevnir um. Goldið verður bert fyri viðgerð, ið hevur lekjandi virknað.
**2.** Goldið verður fyri rímuligar og neyðugar flutningsútreiðslur frá vanlukkustaði til viðgerðarstað og fyri møguligar flutningsútreiðslur frá heimi til viðgerðarstað.
**3.** Viðgerðar- og flutningsútreiðslur kunnu í mesta lagi vera 2% av tryggingarhæddini fyri avlamni. Fyri viðgerð hjá sálarfrøðingi verður goldið fyri upp til 10 viðgerðir og í mesta lagi kr. 20.000.
**4.** Tryggingin tekur bert við í tann mun útreiðslurnar ikki verða endurgoldnar aðrastaðni, t.d. frá lógarkravdari trygging ímóti arbeiðsvanlukku, heilsutrygd, t.e. at útreiðslurnar koma undir heilsutrygd, sjúkratrygging ella sum verða endurgoldnar av almenna sjúkrahúsverkinum.
**5.** Goldið verður ikki fyri viðgerð, sum tryggjaði sjálvur fyriskipar ella fær í lag, um so er, at viðgerðin kann gerast av almenna sjúkrahúsverkinum ella øðrum góðkendum viðgerðarstað, ið lækni ávísir.

**i. Dagpeningur**
**1.** Stendur tað í tryggingarskjalinum, at tryggingin fevnir um dagpeningaendurgjald, verður dagpeningaupphæddin rindað frá tí tíðarskeiðnum, sum stendur í tryggingarskjalinum og í mesta lagið í 3 ár, frá tí at vanlukkutilburðurin hendi. Dagpeningur verður tó í fyrsta lagi goldin, tá ið skaddi gjørdist óarbeiðsførur, tó ikki fyrr enn læknaviðgerðin byrjar og ikki eftir loknað læknaviðgerð, ella eftir at avlamisendurgjald er ásett/útgoldið.
**2.** Tá ið talan er um partvíst óarbeiðsføri, verður dagpeningagjaldið minkað samsvarandi minkaða arbeiðsførinum.
**3.** Dagpeningur verður útgoldin, tá ið málið er liðugt viðgjørt, men vanliga ber til at fáa forskot.

**J. Sálarfrøðilig kreppuhjálp**
**1.** Tryggingin fevnir um sálarfrøðiliga kreppuhjálp, um tú hevur verið við í ella hevur verið har, tá ein av hesum hendingum fór fram, og tað hevði við sær, at tú komst í eina bráðfeingis sálarliga kreppu:
• Álvarslig vanlukka.
• Kríggj, yvirgangur, náttúruvanlukka ella farsótt.
• At næstringur doyr.

betri trygging

# Vanlukkutrygging

- Innbrot, eldur, harðskapur ella álop. Skal fráboðast løgregluni.
- Tú ella næstringur verða lívshættisliga sjúk.
- Eru tú ella makin við barn og uppliva deyðføðing, at missa barnið, fosturlát ella at fáa eitt barn við breki.
- Føðitunglyndi.

Við næstringar er at skilja hjúnafelagi/sambúgvi/skrásettur maki, børn, barnabørn, foreldur og systkin.

**2.** Tryggingin dekkar upp til 10 tíma viðtalu hjá sálarfrøðingi.

**3.** Set teg í samband við okkum, um tú hevur tørv á sálarfrøðiligari kreppuhjálp, áðrenn tú fert í viðgerð. Viðgerðin skal vera í Føroyum og framd av sálarfrøðingi, sum hevur avtalu við Heilsutrygd.

**4.** Tryggingin fevnir ikki um

- um tú hevur fingið ella hevur møguleika fyri at fáa sálarfrøðiliga kreppuhjálp frá aðrari trygging fyri somu hending.
- útreiðslur til flutning til og frá viðgerðarstaðnum. Tryggingin fevnir tó um útreiðslur til flutning, um tú av likamligum og/ella sálarligum orsøkum ikki sjálv/-ur kann koma til og frá viðgerðarstaðnum.

# Vanlukkutrygging

## 4. Dømi um avlamisstig

| Vanlukka | Prosent |
|---|---|
| At missa bæði eyguni ella sjónina á báðum eygum | 100% |
| At missa eygað (fáa eygað tikið) | 20% |
| At missa sjónina á øðrum eyganum | 20% |
| Fullkomiliga mist hoyrnina á báðum oyrum | 75% |
| Fullkomiliga mist hoyrnina á øðrum oyranum | 10% |
| At missa annað beinið | 65% |
| At missa beinið í ella omanfyri knæskelina | 50% |
| At missa fótin | 30% |
| At missa allar tærnar á øðrum fóti | 10% |
| At missa aðra stórutá við ristlegginum | 8% |
| At missa stórutá | 5% |

| Vanlukka | Høgra | Vinstra |
|---|---|---|
| At missa armin í akslaliði | 70% | 65% |
| At missa hondina | 60% | 55% |
| At missa allar fingrarnar á aðrari hondini | 55% | 50% |
| At missa tummilin við handarbeini | 30% | 25% |
| At missa tummilin | 25% | 25% |
| At missa ytsta kong á tumli | 12% | 12% |
| At missa fremstafingur | 10% | 10% |
| At missa ytsta kongin og miðkongin á fremstafingri | 10% | 10% |
| At missa ytsta kongin á fremstafingri | 5% | 5% |
| At missa longutong | 10% | 10% |
| At missa ytsta kongin og miðkongin á longutong | 8% | 8% |
| At missa lekifingur ella lítlafingur | 8% | 8% |
| At missa ytsta kong og miðkongin á lekifingri ella lítlafingri | 5% | 5% |
| **Á lámi verður vinstra mett sum høgra og høgra sum vinstra** | | |

# Vanlukkutrygging

## 5. Tilvalstryggingar

Tryggingin fevnir einans um hesar um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

### 5.1 Skundendurgjald

**5.1.1 Tryggingin veitir endurgjald um tú í sambandi við ein vanlukkutilburð fær**

- beinbrot
- krossbandið helt ella lutvíst støkkur sundur
- hælsinan verður heilt rivin av
- meniskskaða í knæ

Við beinbrot er at skilja brot á óstbein, øksl, yvirarm, undirarm, alboga, skøvning, handarbein, nakka, rygg, halabein, koku, mjødn, lær, legg, knæ, økul og fótablað.

**5.1.2 Tryggingarupphæddin**

Tryggingarupphæddin er kr. 10.000,00.

**5.1.3 Tryggingin fevnir ikki um:**

Brot ella skaðar á aðrar liðir, limir ella likamslutir enn teir, sum eru nevndir í 5.1.1. Eitt nú fevnir tryggingin ikki um fingrar og tær.

**5.1.4 Skjalprógv**

Vit skulu hava skjalprógv um beinbrot frá skaðastovu, læknajournal og røntgenkanning. Fyri skaða á krossband skulu vit hava myndir frá skanning ella kikarakanning.

**5.1.5 Endurgjald**

Endurgjaldið verður útgoldið, tá vit hava fingið frágreiðing frá serlækna um skaðan.

Endurgjaldið verður útgoldið einaferð fyri hvønn vanlukkutilburð. 50% hægri endurgjald verður útgoldið, um tveir ella fleiri skaðar henda í sama vanlukkutilburði.

Henda fleiri skaðar í sama likamsluti í einum vanlukkutilburði, verður bert útgoldið fyri ein skaða. Eitt bein, til og við mjadnaliðið, er at meta sum ein likamslutir. Ein armur, til og við akslaliðið, er at meta sum ein likamslutur.

### 5.2 Tyggiskaði

**5.2.1 Tyggiskaði**

Hóast ásetingina í grein 3.2 f., er tryggingin víðkað til at fevna um skaða á tenn og tannprotesur, sum koma av at tyggja.

**5.2.2 Tryggingarupphæddin**

Tryggingarupphæddin er kr. 10.000,00.

**5.2.3 Endurgjald**

Endurgoldið verður í mesta lagi fyri ein skaða um árið.